# Krzysztof mitt í rúgvuni

Aarhus Fremad, har Krzystszof Popczynski er venjari, vann um vikuskiftið dyst í 2. deild vestur í Danmark. Aarhur Fremad spældi á heimavølli ímóti Holstebro, og hóast gestirnir tvær ferðir løgdu seg á odda, megnaði Aarhus Fremad vinna dystin. Úrslitið gjørdist 3-2. Aarhus Fremad hevur 21 stig fyri 14 dystir og liggur mitt at stigatalvuni. 10 stig eru upp til uppflytingarplássini 12 stig niður til strikuna.



# Silkeborg tapti

Silkeborg við Christian Lamhauge Holst tók leygardagin ímóti OB, sum er oddalið í donsku superliguni, og her mátti Silkeborg lúta. Úrslitið gjørdist 1-0 til gestirnar, og var tað eitt sjálvmál frá Jim Larsen, sum gjørdist avgerandi. Sjálvmálið kom um miðjan seinna hálvleik, og hóast Silkeborg royndi, so eydnaðist tað ikki at svara aftur. Silkeborg er nú nummar fimm í donsu superliguni við 23 stigum. OB hevur 32 stig.

## Hondbóltur

### Sunset-kappingin

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 182 | 126 | 56 | 10 |
| 2 Tjaldur | 5 | 5 | - | 0 | - | 0 | 165 | 116 | 49 | 10 |
| 3 Neistin | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 136 | 112 | 24 | 8 |
| 4 VÍF | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 110 | 148 | -38 | 2 |
| 5 StÍF | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 81 | 126 | -45 | 0 |
| 6 VB | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 99 | 145 | -46 | 0 |

### Atlantic Airways-kappingin

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 7 | 5 | - | 0 | - | 2 | 217 | 188 | 29 | 10 |
| 2 StÍF | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 171 | 162 | 9 | 8 |
| 3 H71 | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 151 | 150 | 1 | 6 |
| 4 Kyndil | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 158 | 165 | -7 | 6 |
| 5 VÍF | 6 | 2 | - | 0 | - | 4 | 171 | 167 | 4 | 4 |
| 6 KÍF | 7 | 2 | - | 0 | - | 5 | 163 | 199 | -36 | 4 |

## Flogbóltur

### Eik-ligan, kvinnur

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 4 | 4 | - | 0 | 12 | 0 | 12 | 8 |
| 2 Mjølnir | 4 | 3 | - | 1 | 9 | 6 | 3 | 6 |
| 3 TB | 4 | 2 | - | 2 | 9 | 6 | 3 | 4 |
| 4 Dráttur | 5 | 2 | - | 3 | 9 | 9 | 0 | 4 |
| 5 Fleyr | 3 | 2 | - | 1 | 6 | 6 | 0 | 4 |
| 6 ÍF | 5 | 1 | - | 4 | 3 | 12 | -9 | 2 |
| 7 KÍF | 3 | 0 | - | 3 | 0 | 9 | -9 | 0 |

### Eik-ligan, menn

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 5 | 5 | - | 0 | 15 | 5 | 10 | 10 |
| 2 SÍ | 5 | 4 | - | 1 | 14 | 7 | 7 | 8 |
| 3 Fleyr | 5 | 1 | - | 4 | 10 | 12 | -2 | 2 |
| 4 ÍF | 5 | 0 | - | 5 | 0 | 15 | -15 | 0 |




## Máltindurin, hondbóltur

| Sunset-kappingin | | Mál (br.) |
|---|---|---|
| Adina Petrea | Tjaldur | 61 (8) |
| Valentina Suciu | Stjørnan | 45 (9) |
| Simona Petersen | Stjørnan | 37 (7) |
| Cornelia Rimbu | Tjaldur | 35 (1) |
| Joan M. Djordjevic | Stjørnan | 24 |
| Marinela Patru | Tjaldur | 24 (1) |
| Jacklin Durhuus | Neistin | 23 |
| Liljan Durhuus | VÍF | 23 (6) |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 22 (3) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 21 (4) |
| Una Olsen | Stjørnan | 18 |
| Annika Thomsen | Tjaldur | 18 |
| Anja Heinadóttir | Neistin | 17 |
| Rakul Augustinussen | Neistin | 17 (4) |
| Bára Mortensen | VB | 16 |

| Atlantic Airways-kappingin | | |
|---|---|---|
| David Edvardsen | Neistin | 52 (10) |
| Poul Kjartan Dam | H71 | 51 (14) |
| Sámal Joensen | VÍF | 47 (17) |
| Cristian Preda | StÍF | 44 (4) |
| Jugoslav Djumic | Neistin | 41 |
| Bárður Johannesen | Kyndil | 33 |
| Josef Abrahamsen | Kyndil | 32 (10) |
| Gabriel Stanciu | StÍF | 29 (5) |
| Heini Hanusarson | Neistin | 28 (1) |
| Finnur Hansson | Neistin | 27 (2) |
| Ási Dam | KÍF | 26 (19) |
| Høgni Klein | Kyndil | 25 |
| Agnar Joensen | VÍF | 24 |
| Bjarti Hansen | VÍF | 23 |
| Dánjal Tórgarð | H71 | 21 (5) |

# Aalesund er steypavinnari

**Brotssparkskapping skuldi til, áðrenn Aalesund tryggjaði sær norska steypið við sigri á fyrrverandi felagnum hjá Jákupi Mikkelsen**




Heri Simonsen

Norska kappingarárið endaði við einari dramatiskari steypafinalu á Ullevaal Leikvøllinum í Oslo, sum var millum grannaføgini úr Møre og Romsdals Fylki, Aalesund og Molde. Aftaná bæði longda leiktíð og brotssparkskapping gjørdist endin, at Aalesund vann 7-6.

Danski málverjin, Anders Lindegaard gjørdist tann stóra hetjan hjá Aalesund, tí hann bjargaði tí avgerandi brotssparkinum, tá støðan var 7-6 til Aalesund.

Støðan eftir vanliga leiktíð var 1-1. Í longdu leiktíðini fingu liðini hvør sítt mál, og tí gjørdist tað neyðugt at avgera steypafinaluna við brotssparkskapping.

Hetta er fyrstu ferð, at Aalesund vinnur norsku steypakappingina, og er talan um størsta dagin í søguni hjá AaFK, sum liðið verður nevnt millum sunnmøringar. Talan var um eitt megnaravrik hjá Aalesund, tí stóran part av dystinum spældu teir við 10 monnum.

Í Noregi er steypafinalan altíð ársins dystur. Fult er á Ullevaal Leikvøllinum til hvørja steypafinalu, og túsindtals fólk standa á bíðilista fyri at ogna sær eitt atgongumerkið til steypafinaluna. Heima í Aalesund hevði AaFK skipað fyri, at fólk kundu koma til leikvøllin hjá AaFK og síggja steypafinaluna á risastórum sjónvarpsskíggjum.



Danski Anders Lindegaard varð stóra hetjan hjá Aalesund, sum eftir brotssparkskapping vann norsku steypakappingina